LAGNAN hjá norsku sildini

Í samband við dapra útlitið fyri sildaveiðuni í Norðsjónum, er áhugin fyri norska sildastovninum, ella sum vit vanliga róptu hana íslandssildini, vaksin aftur.

Teir fiskimenn, sum tóku lut í sildaveiðuni norðanfyri í 1968, fáa seg ikki at trúgva, at hon kann vera uppfiskað, flestu teirra halda heldur, at hon hvarv norður ígjøgnum undan skipunum, og sostatt bert hevur broytt gongdina.

Samstundis hoyrsat tíðindi úr Íslandi um sild. Og norskir fiskimenn siga frá, at teir síggja nógva sild á gomlu gýtingarleiðunum.

Fyri at fáa skil á hesum, er neyðugt at gera sær greitt, at fleiri stovnar eru til í sildini norðanfyri, sum einki samband hevur við Norðsjóarsildina. Hesa sildina í Norðurhavinum rópa vit eisini Atlanto-skandisku sildina eftir Atlantshavinum og Skandinavisku hálvoynni.

Stovnarnir norðanfyri eru:

Íslendska várs:ildin, sum gýtir á Suðurlandinum,
Íslendska summarsildin, sum gýtir somu støð í august-september,
Norska vársildin, sum gýtir á norsku vesturstrondini og bankunum eystan fyri Føroyar í mars.

Haraftrat rokna menn við einum stovni, sum hoyrir til leiðina um Viking Bank og gýtir har seint á vetri.

Av hesum stovnum, er hin einasti, sum er nøkulunda væl fyri, Íslendska summarsildin, og tað er um hana tíðindini úr Íslandi eru. Hóast hon tykist at vera í framvøkstri aftur, hava Íslendingar ikki loyvt veiðu eftir henni í ár. Hin Íslendska vársildin er heilt niðurundirkomin, stovnurin er í botni.

Nógv hin størsti stovnurin var hin norska sildin, og tað var serliga hann, menn veiddu á Norðurlandinum, og eystur úr Íslandi-norðan fyri Føroyar tey góðu heystini í 50'unum og upp til 1968. Aftaná gýtingina leitaði hesin stovnur sær út á hesi øki at ganga á beiti og fitast upp til veturin, og tá veiddu garnaskipini hana. Tá fiskimenninir siga, at gongdin var løgin í 1968, er hetta rætt, og varð hon hetta bæði í 1967 og 1968.

Hesi árini var hitin í sjónum ógvuliga óvanligur, og gjørdi hetta, at sildin fekk heilt aðra gongd enn vant.

Í staðin fyri at ganga á beiti á vanligum leiðum, helt ein stórur partur av henni heilt norður í gjøgnum undir Bjarnoynna og Svalbard.

Gongdin hesi bæði árini sæst á kortinum.

Í 1968 var heildarveiðan av hesi norsku sild komin heilt niður móti 200.000 tonsum móti yvir 1 millión tonsum árini undan. Men hóast hetta gekk sildin tó somikið saman at nakað var at fáa.

Í 1969 fekkst at kalla eingin sild hvørki á gomlu heystfeltunum ella longur norðuri. Sovjettisk skip fingu eitt sløð og eitt sindur varð veitt undir gýtingini; tað var alt.

Og síðani hetta hevur sildin ikki verið at síggja fyrr enn nú í 1973, tá norðmenn funnu gýtandi sild á gomlu gýtingarfeltunum. Har, sum sild var at síggja, gekk hon tøtt, men økið, hon sást á, var lítið og einki.

Sildin, sum varð kannað, var av árganginum 1969, sostatt nú 4 ára gomul og er hon tí nýbúgvin og gýtir fyri fyrstu ferð.

Orsøkir til afturgongdina

Fiskifrøðingar eru í dag samdir um, at orsøkin til stóru afturgongdina er bæði ovurfisking og náttúruorsøkir.

Ovfisking stóðst av tí ovurstóra vøkstri, sum kom mitt í 60'unum, serliga í norska veiðiflotanum, tá kraftblokkurin vann fram.

Náttúruorsøkirnar eru, at vit ikki síðan 1959 og 1960 hava havt reiðiligar stórar árgangir av sild.

Av tí, at tilgongdin av yngli og ungsild hevur verið so lítil, er gamli stovnurin við tíðini fiskaður upp, ella í hvussu so er, er støddin komin so langt niður, at hann fiskast ikki.

Meðan stovnurin, tá hann var uppá tað besta, var mettur at vera 14 mill. tons, so mettu fiskifrøðingar hann í 1960 — sambært ekkoloddingar — til í mesta lagi at vera uml. 700.000 tons og neyvan stórt meira enn



Sildagongd 1967-68

250.000 tons, og er hetta ein ógvuliga lítil nøgd, tá hugsað verður um víða økið.

Norðmenn fylgja serstakliga væl við lagnuni hjá hesari sildini. Teir leita um heystið um alt Barentshavið eftir sildayngli, men har hevur verið svart síðan 1970 inntil í ár, tá teir aftur funnu minni nøgdir av sild, sum var gýtt sama árið.

K. H.

(Endurprent úr tíðarritinum »Tíðindi frá fiskirannsóknarstovuni« fyri september—desember 1973).

NORRØN UNGDÓMSLEGA í Íslandi

ÍSF hevur fingið innbjóðing, og áheitanir eru sendar ítróttarfeløgunum um luttøku

Í døgunum frá 28. juni til 6. juli skipar Ítróttarsamband Íslands fyri norrønari ungdómslegu við Laugarvatn, nærindis Reykjavík. Ætlanin er at fáa tilsamans 60—70 luttakarar, ella 10 luttakarar í aldrinum 15—18 úr hvørjum einstøkum av norðurlondunum.

Millum teirra, sum longu hava fingið innbjóðing, er ÍSF, og hevur starvsnevndin í hesum sambandi sent áheitanir út til hvørt einstakt ítróttarfelag í landinum.

Ætlanin er, at so nógvar ítróttargreinir sum gjørligt skulu fáa møguleika at luttaka. Um fleiri enn 10 siga frá luttøku, skilar nevndin sær rætt til at velja imillum luttakararnar, verður sagt í áheitanini til feløgini.

Ferðina til og frá Íslandi verður hvør luttakari at greiða sjálvur, meðan uppihaldið í Íslandi er ókeypis.

Framhald frá 1. síðu.

in ávikavist skotið upp, at samskattingin verður avtikin og at útreiðslur til umsiting av húsum verða at skipa sum frádráttur.

Landsstýrið hevur í fyrra førinum skotið upp, at konufrádrátturin verður hækkaður úr 2000 upp í 4000 kr. Hetta sum eina fyribilsloysn.

Ógvuliga lítil bati

Jógvan Sundstein, úr fólkaflokkinum, helt, at landsstýrisuppskotið var ikki nógv at taka av. Hann segði seg vóna, at uppskotið til serstaka skatting av partafeløgum fer at hava meiri kjøt uppiá.

Jógvan Sundstein:

Sambært prísútviklingin, sum er farin fram, skuldi konufrádrátturin verið uppi á í minsta lagi 5—6000 kr. Men ein konufrádráttur kemur ið hvussu er at

Jógvan Sundstein — skattalógin ein sovipúta.

revsa hjúnarlagið. Havast má í huga, at um hjúnarfelagarnir arbeiða úti og vinna nógvan pening verður skatturin hareftir. Her er at taka við aðrari hondini og geva við hinari. Tað ber ikki í dag til at tala um inntøkur uppá 10—15.000 kr., sum landsstýrið sambært uppskot tess ætlar at geva skattalætta, men um inntøkur uppá 40—50.000 kr. Skattatrýstið verður nú at vaksa í kommunum.

— Her er onki perspektiv aftanfyri, segði Jógvan Sundstein, sum somuleiðis eftirlýsti eina rættiliga gjøgnumgongd av skattalógini. Hann segði, at skattalógin framvegis verður ein sovipúta.

— Skattanevndin, sum fær uppskotið til viðgerðar, vil arbeiða dúgliga við málinum, so kanska í komandi skattaári kunnu vit fáa eina aðra skattagøtu at ganga eftir, segði Jógvan Sundstein.

Finnbogi Isaksen, úr tjóðveldisflokkinum, segði seg hava væntað meiri burtur úr uppskoti landsstýrisins. Her er ógvuliga lítil bati, helt hann.

Finnbogi Isaksen:

— Sambært útrokningar frá manni við starvi í skattaumsitingini er skattatrýstið vaksið rættiliga nógv síðan 1964. Meðan 17 pst. vórðu skattað av einari inntøku hjá arbeiðsmanni sum uppihaldara hetta árið verður løn hansara í dag, sum er vorðin nakað hækkað, skattað við 43 pst. Tær stóru prosentlækkingarnar í uppskoti landsstýrisins ríma als ikki við lækkingar í krónum.

— Galdandi skattalóg revsar hjúnarlagið samstundis sum samfelagið verður grundað á hjúnarlagið. Hjún megu verða skattað hvørt sær og síðani kunnu

Finnbogi Isaksen — kvinnurnar vanvirdar.